# Vilja bróta tabu

Bólkurin Páll Finnur Páll er kendur fyri sínar til tíðir provokerandi sangir, har nomið verður við viðkvom evni í samfelagnum. Ein av sangunum á seinastu fløguni hjá bólkinum, Førist, er Herbergið. Ein sangur, sum bleiv eitt hitt, og er ein roynd at seta orð á nakað, sum verður tagt burtur í Føroyum í dag, heldur sangskrivarin, Páll Oddur Rubeksen

HEIMLEYS
*Solby A. Eliasen*
*solby@mail.djh.dk*

Sangurin, Herbergið, hjá bólkinum Páll Finnur Páll er ein av fleiri hjá bólkinum, har nomið verður við viðkvæmar trupulleikar í føroyska samfelagnum. Speisemi er ein sera týdningarmikil lutur í tí endaliga úrslitinum, sum skal út til fólkið

Tað er Páll Oddur Rubeksen, sum hevur skrivað sangin, Herbergið. Hann dylir ikki fyri, at sangurin varð skrivaður fyri at provokera.

– Eg royndi at hava nakað av skemti ella speisemi í tekstinum, tí tað ger tað ofta lættari hjá fólki at sodna serliga tá talan er um provokatión, greiðir Páll Oddur Rubeksen frá.

Hann heldur fram, at á ein ella annan løgnan hátt, so letur tað ikki til, at tað syrgiliga rørir við fólk á sama hátt, sum ein tekstur, har tú bart út roynir at provokera fólk til at lurta. At síggja tað, sum hendir beint framman fyri teimum og ikki minst at gera nakað við tað.

– Vit hava ikki givið handan sangin út fyri at senda ein far út og hjálp hesum menniskjunum boðskap út, men vit royna bara hervið at fáa fólk at leggja merki til, at tey eru her. At vit hava hendan trupulleikan í Føroyum, sigur hann.

Sum flest allir tónleikarar vilja limirnir í Páll Finnur Páll undirhalda fólki við góðum tónleiki. Páll Oddur sigur, at teir ikki á nakran hátt eru samfelagsrevsarar ella royna at koma við nakrari loysn upp á trupulleikar í samfelagnum. Bólkurin roynir at raka fólk og bróta tabu–evni.

– Heimleys eru bara eitt av evnunum ella trupulleikunum, tú ikki tosar um í Føroyum, men vit síggja tey hvønn dag, sigur Páll Oddur og nevnir onnur dømi sum siðamisbrot og rúsdrekka– og rúsevnismisnýtslu.

Páll Oddur Rubeksen heldur, at tað letur til, at fólk bara hava góðtikið tey heimleysu sum ein part av dagligu býarmyndini í Havn. At tað er í lagi at vera heimleysur. Men tað líkist svartasta ongum í einum vælferðarsamfelagið, heldur sangskrivarin úr Páll Finnur Páll.

– Tey einastu, sum taka stig til til at hjálpa teimum heimleysu, eru hjálparfelagsskapirnir, sigur hann og heldur fram, at hesi fólk hava ein prís uppiborið fyri teirra ótroyttiliga arbeiði.

Sangurin, Herbergið, lá á 15 teimum bestu í Útvarpi Føroya frá 27.08.2005 til 17.12.2005. Tað er 15 vikur. Harav lá hann tólv vikur innan fyri topp fimm.

**Herbergið/Páll Oddur Rubeksen**

*1. ørindi*

Vit eru heimleysir
og vit hava ongar pengar
Renna runt í Havnini
Sum nakrir ólukkufangar
Fólk tey flenna tá vit koma
framvid
Aldrin er tad nakar sum situr vid
okkara lid

*Nidurlag:*

Vit búgva á Herberginum
Vit hava eina heila madrass í part
Vit gingu einaferd í skúla
Men har hava vit einki lært
Vit búgva á Herberginum
Vit hava eitt heilt yoghurt í part
Vit dugdu einaferd at arbeida
Men nú hava vit gloymt alt
Sum vit hava lært

*2. ørindi*

Her eru grønlendarir
Tad kemur ein nýggjur hvørt ár
Og teir verda gensplejsadir
Tá eggini eru klár
Fólk tey flenna tá teir koma
framvid
Aldrin er tad nakar sum situr vid
teirra lid



*Sambært álitinum um heimleys hevur Sambært álitinum um herbergið pláss fyri fýra sovandi fólkum. Niels Edvard Olsen, leiðari á herberginum sigur, at veruliga talið liggur um átta í miðal hvørja nátt*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

## Allar kommunur eiga at rinda

Annita á Fríðriksmørk, limur í Trivnaðarnevndini, sigur, at sjálvandi tekur Tjóðveldisflokkurin undir við, at eitt hús verður bygt til tey heimleysu í Føroyum. Flokkurin hevur tó ikki sæð álitið um tey heimleysu ella uppskotið, sum Hans Pauli Strøm fer at leggja fram.

– Vit vita tó, at ætlanin er at býta fíggingina millum land og kommunu, men vit vilja ikki fara niður í smálutir og gera viðmerkingar til tekniskar spurningar, sum støðan er nú, sigur Annita á Fríðriksmørk.

Hvørt tað skal vera Tórshavnar kommuna, sum hevur ábyrgdina fyri og rindar fyri tey heimleysu, tí tey bert finnast í høvuðsstaðnum, sigur tingkvinnan hjá Tjóðveldisflokkinum, at tað átti at verið nakað, sum allar kommunur seta pening av til.

– Tað er tað sosiala rætta, at ein kommuna játtar pening til eitt tílíkt endamál. Gott er tað eisini, at kommunalpolitikkarar harvið fáa á eina áminning um, at tað búgva borgarar í kommununi, sum vaksa upp og gerast heimleysir, vísir Annita á Fríðriksmørk á.

## Reyði Krossur bíðar eftir handverkara

Ongin handverkari fæst til at gera undirstøðið til skúrin, sum Reyði Krossur ætlar at seta upp á Skálatrøð, og tískil er skúrurin ikki komin upp at standa enn.

– Alt var klárt til jóla. Vit mangladu bara ein múrara, sum skal stoypa undirstøðið til sjálvan skúrin. Og hann mangla vit enn, sigur Suni Vinther, formaður í Reyða Krossi.

Skúrurin hjá Reyða Krossi er ætlaður sum eitt tilboð til heimleys, sum verður opið frá klokkan 10 til 22. Tað vil siga, at hesin skúrurin verður eitt tilhaldsstað hjá teimum heimleysu í tíðarskeiðinum, har hini bæði tilboðini, kaffistovan hjá Bláa Krossi og herbergið, hava stongt ein part av degnum.

Hetta er ein verkætlan, sum kemur at vara í mesta lagi tvey ár. Tórshavnar býráð hevur latið Reyða Krossi økið við Skálatrøð til skúrin hesa tíðina. Ongin umsjón verður dagliga, men fólk verður sett til at læsa skúrin og at gera reint.

– Tey heimleysu fáa hervið sjálvi nakað av ábyrgd, sigur Suni Vinther, formaður fyri Reyða Krossi Føroya.